

**RÚSAN**

*Nú verður kannað eftir, hvussu raksturin hjá Rúsuni kann verða effektivari. Ein tanki er at bjóða virksemi hjá Rúsuni út í almennum útboði, men stjórin á Posta sær stórar fyrimunir í at leggja Rúsuna og Posta saman*

# VIRKSEMI HJÁ RÚSUNI BJÓÐAST ÚT

**RÚSAN** Ein møguleiki, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hugsar um, er at bjóða virksemi hjá Rúsuni út og so kann Posta bjóða á jøvnum føti við aðrar veitarar

Áki Bertholdsen

Í næstum verður ymiskt virksemi hjá Rúsuni kanska bjóðað út.

Tað er í hvussu so er eitt hugskot, sum Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum hevur reist.

Hann sigur, at lógin áleggur Rúsuni at hava eitt ávíst avlop.

Men samstundis áleggur lógin eisini at Rúsan skal tálma nýtsluni

Í hesum sambandi varð prísurin hækkaður nakað síðani og tað førdi til minni sølu.

– Av tí, at sølan er minkað, er avlopið minkað. Men kravið til avlop er stórt og tí má sølan økjast fyri at halda lógina.

Sostatt mugu onnur stig takast fyri at halda lógarkravda avlopskravið, sigur hann.

– Hetta eru krøv, sum eru fullkomiliga í andsøgn við hvørt annað og tað setir avvaraðandi landsstýrisfólk í eina rættiliga stóra knípu. Tað er ringt at blása og hava mjøl í munninum, men landsstýrismaðurin má halda lógina, annars fær hann trupulleikar mótvegis Løgtinginum.

Sostatt liggur Johan Dahl, sum lús ímillum tvær negl.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað besta hevði verið at sloppið Rúsuni undan einum kravi um avlop.

– Ístaðin fyri kundu avgjøldini verðið hækka, men so sleppur Rúsan undan ábyrgdini at bera eitt ávíst avlop í landskassan um árið.

Ella kann Rúsan skipast uttanfyri fíggjarlógina, akkurát, sum Apotekið.

### Bjóðast út

Men eydnast tað ikki, er neyðugt, at taka onnur stig takast fyri at kunna halda lógina.

Eitt av hesum stigum er at Rúsan og Posta verða samansjóðað.

– Tað kann hava fyrimunir við sær við umsiting, hølum, flutningi og øðrum, sigur Johan Dahl.

Men hann staðfestir eisini, at verður virksemi hjá Rúsuni lagt út til onnur, má tað bjóðast út í fríari kapping.

- So kann Posta bjóða upp á virksemi á jøvnum føti við aðrar veitarar, tí tað ræður um at fáa tað bíligasta tænastuni, leggur hann afturat.

Johan Dahl sigur, at enn er ongin avgerð tikin, men at hetta eru møguleikar, sum eru nevndir fyri at kunna halda lógina.

Í hesum sambandi nevnir hann eisini, at eftirsum bryggjarí kortini hava sølustøð kring landið, hví so ikki bara fáa øl í handlarnar

– Tað er væl ongin munur á at fara í ein handil og at fara í eitt depot at keypa, sigur hann.

Hann sigur, at alt hetta eru viðurskifti, sum mugu takast upp politiskt. Men hann leggur afturat, at tað átti at borið til at fingið semjur um eina skilagóða loysn.

aki@sosialurin.fo

## Hava tosað saman

Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsuni váttar, at tey hava tosað við Posta um samstarv.

Vit hava greitt frá, hvør okkara tørvur er og meiri er ikki hent í málinum.

– Hetta er alt á kanningarstøði enn, sigur hon

Hon sigur, at Posta er væl fyri, hvat hølum og flutningi viðvíkur og støðan er longu tað, at Posta flytir rættiliga nógv fyri Rúsuna frammanundan.

Men hon leggur dent á, at Rúsan kann ikki frammanundan taka ein veitara fram um ein annan og skal virksemi hjá Rúsuni í samstarv við aðrar stovnar ella fyritøkur, er ongin ivi um, at má tað bjóðast út í almennum útboði.